

*Hans Johannes Gaard, sum sigldi við Álaker, Livvi Dam og Siegfred Linheyggj, beiggi Andrias.*



*Fyrsti bátur inn í nýggju bátahavnina í Oyndarfirði. Umborð eru teir elstu menninir í bygdini: Petur Klein, Mourtis, Lias Karl, Dánjal á Bakka, Andrias í Tarti og Hans Jakku á Bakka. Úr bókini um Tórshavnar Skipasmiðju.*

og vit høvdu fýra bátar. Ein av teimum var ein seksæringur, sum kallaðist "Gullborg". Tað var ein skúvoyingur sum átti hann, Grettir Valdimarsson. Tann báturin tók nógv. Eg haldi, at ein bátur kallaðist "Føroyingurin". Eitt áttamannfar kallaðist "Úlvurin". Tað var ein skúvoyingur, sum dreiv hann, Hans Johannes Hendriksen. Vit royndu á Kappaleiðini, men eisini í Gretufjørðinum, har vit byrjaðu. Vit fóru so suður á Kappan, og eg minnist væl, at teir keyptu hesi radioapparatini í Føroyingahavnini, sum teir kundu peila við. Hetta høvdu allir bátarnir, og hetta var sera gott. Eg minnist 2.bestimannin, Absalon Jensen á Strondum. Hann peilaði seg fram við hesum apparatinum, tá vit fóru á Kappan. Teir brúktu tað eisini, tá mjørki var. Tá tann fyrsti báturin kom inn, peilaði hann hinar bátarnar.

Vit komu einaferð soleiðis fyri, tá vit lógu í Kookoyggjunum, at ein bátur fann ikki inn aftur til skipið. Tá fór maskinmeistarin við einum báti við hesum apparatinum at peila. Hann kom so til bátin og loðsaði hann inn.

Nú er tað ein sunnudagur, vit liggja í Kookoyggjunum, og nú vildu grønlendingarnir sleppa inn í Godthaab, tí tað var so stutt at stima. Jú, skiparin lænir teimum ein bát, og tað var tann ringasti báturin sum var. Hann var kanska eitt áttamannafar.

Teir fóru so við tí bátinum og skuldu vera aftur sunnudagin. Nú er mánamorgun, og eingir menn koma aftur. Tískil mátti eg fara við einum av bátunum, og tað var eisini rokfiskarí. Tað stóð ikki á at draga við snelluni.

John Erling, sonurin, var við "Gullborg", 14 ára gamal, og hetta var hansara fyrsti túrur til skips. Tað var so nógvur fiskur. Vit fingu fullan seksæring úr stevni í stevn. Skott var sett, so fiskurin ikki skuldi koma í maskinrúmið. Tá var John Erling móður, "harra gud ikki". Eg fór við tí bátinum. Skipari var Poul Johannes av Strondum. Bestimenn vóru Absalon Jensen og Petur Klein.

Sum ofta er komu eisini konufólk umborð, og einaferð leyp ein genta á sjógv. Tað var so heldugt, at vaktarskipið á inni, so teir fingu bjargað henni.

Vit róðu út við bátum á Kapp-anum. Hetta gjørdist ein drúgvur men góður túrur. Hann vardi í seks mánaðir, og vit komu heim í oktober. Eg fekk kr. 6.500 fyri tann túrin, og var hetta gott tá.



*Kjartan Mohr var ein frálíkur reiðari. Her saman við konuni Dennu.*




*Nósi*

Tað fingust 140 sterling pund fyri tonsið av saltfiski. Tá lá eitt pund um 20 kr, og prísirnir hækkaðu nógv júst hesa tíðina.

## 1963. Til Íslands at arbeiða

Í 1963 fór eg til Íslands at arbeiða á einum flakavirki á Hafnarfjørðinum. Vit vóru 5 mans. Tað vóru umframt meg sjálvan tríggir strandingar og ein kollfirðingur. Strandingarnir vóru Jógvan á Forunum, Kaj og Henry Frederiksberg, sum druknaði við "Stathav" í Hólmasundi.

Teir kastaði nót eftir fiski, og var hetta eitt tað síðsta árið, hetta var gjørt. Nógvir fóru á heysin, tí teir fingu so lítið av fiski. Tað var so forferdiligt, sum fiskurin var stórur. Hóast eg havi roynt so nógv á Suðurlandinum, minnist eg ikki fisk í hesi støddini. Vit fóru at viga ein fisk, og hann vigaði 80 pund, og rognini vigaðu 12 pund.

Nú skal fiskurin avhøvdast, men tað blívur so tungt at arbeiða. Teir mugu rigga transportband til fyri at lætta um. Tá fer fiskurin eftir bandinum og kemur niður á eina hill. Maðurin, sum avhøvdaði, mátti leggja knívin frá sær og taka báðar hendur fyri at taka fiskin at avhøvda hann. So stórur vóru toskarnir.

Jógvan Poulsen á Strondum var ein grúiliga raskur maður. Hann var ein royndur fiskimaður og beint frammandan hevði hann siglt við "Knørri", ein slupp á Strondum. Jógvan tók ryggin úr, tá flakt varð, og tað skuldi eisini sterkur maður til hetta. Hann var ein óføra raskur maður. Vit lakasaltaðu fiskin. Teir høvdu gjørt sovorðnar tættar trækassar, har fiskurin varð lakasaltaður.

Nú er tað ein føroyingur, sum er formaður fyri ein bát í Keflavík, og honum manglar ein flekjara. Eg varð so settur at taka ryggin úr saman við einum íslendingi, sum eingin vildi arbeiða saman við. Mannagongdin við fleking er jú, at ein maður sprettir fiskin oman í stertin, meðan ein annar tekur ryggin úr. Men hesin vildi bara kappast og køva hin. Hann spretti so tunt og harvið skjótt, og hetta gjørdi, at tað var truplari enn neyðugt hjá makkaranum at taka ryggin úr. Hetta kláraði eg ikki, og eg var so bara tann dagin. Ein annan dag koma teir aftur at biðja um ein mann, og tá var tað, at Jógvan fór. Hann kláraði hetta sum einki at arbeiða undan hinum, og tað dámdi íslendingunum væl.

Nú kemur tað út á várið, og fiskurin skal pakkast. Fiskurin var so stórur, at tað fóru seks fiskar í pakkan, sum mundi vera um 100 pund. Men veiðan við nót gjørdi av við hendan stóra fiskin.

## Mazeppa

Aftaná "Víking" fer John at føra "Mazeppu" í sildina í 1964. Eg fór við sum bestimaður, Frits úr Oyndarfirði var 2.bestimaður. John hevði hana í tvey ár. Tað gekk gott og vit fingu nógva sild. So var eg í Íslandi um várarnar, og í 1965 var eg við "Havfarinum" í sild. Bernhard Hansen í Fuglafirði var skipari, men tá var eg bara við sum maður. Vit fingu nógv.

## Havfrúgvin

Síðsta árið eg var á sild var við "Havfrúnni". Vit vóru fyrst í Grønlandi. Tað gekk ikki so gott, men so fóru vit í sild, og tað gekk gott, so tað varð kortini eitt hampiligt ár. Skipari var Niels Jacob Nielsen av Strondum, sum eisini átti hana.

## Útróður

Nú fari eg at rógva út. Fiskimark-ið var jú farið út á 12 fjórðingar í 1964, og skuldi hetta merkt eina góða framtíð fyri útróður. At rógva út merkti eisini møguleikar fyri at vera meira heima.